## Desember

# Kvinnurnar sluppu at royna seg



*Føroysku hondbóltskvinnurnar taptu fyri Svøríki, men millum annað stórspæl frá Sóleyð Mikkelsen ber boð um, at knotur eru í liðnum.*

### 1. desember

Undan dystunum móti Svøríki kann føroyski liðskiparin, Jórun Ludvig, bert lova, at tær fara at stríðast alt tað, sum tær eru mentar.

### 5. desember

Ein partur av føroyskari ítróttasøgu varð skrivaður, tá føroyska kvinnulandsliðið fór á vøllin í Klaksvík, har tær spældu undankappingardyst móti Svøríki.

Hóast Føroyar taptu báðar dystirnar, eru fólk á einum máli um, at liðið hevur nakað at byggja á. Serliga í seinna dystinum, var føroyska spælið til tíðir gott, meðan fyrri dysturin í stóran mun var merktur av nervum frá okkara.

Í flogbóltskappingini er oddurin framvegis hin sami, men nú tykist Fram aftur at hava fingið ferð á.

### 6. desember

Havnar svimjifelag hevur sett russiskan venjara at taka sær av venjing felagsins.

Í Danmark eru føroyskir svimjarar á liðnum hjá Swim-Tam West úr Esbjerg, sum vinnur DM fyri lið. Teir báðir føroyingarnir eru Ásbjørn Hansen og Eivind Eysturoy.

### 8. desember

Búgvi Poulsen luttekur í sterkari judo-kapping í Svøríki, men sleppur ikki langt, tí hann beinan vegin rennir seg inn í tveir sterkar mótstøðumenn.

GÍ hevur gjørt sáttmála við ein fyrrverandi pólskan landsliðsleikara, sum komandi árið skal spæla við felagnum.

Í bestu mansdeildini vinnur StÍF á H71, meðan Neistin vinnur í Runavík.

### 9. desember

Stórur spenningur er undan klassikaranum millum Kyndil og VÍF. Kyndil hevur til tíðir sýnt stórspæl, og roknað verður við, at teir kunnu geva vestmenningum dygga mótstøðu.

### 12. desember

Javnleikur varð úrslitið millum stórliðini, og við javnleikinum móti Kyndli missir VÍF fyrstu stigini á árinum.

Í flogbóltinum togar mansliðið hjá Mjølni frá hinum liðunum. Nú er munurin niður til næsta liðið fýra stig.

### 13. desember

10 ára gamli strandingurin, Dánjal Jákup, tekur øll á bóli, tá hann vinnur árligu boccia-kappingina hjá ÍSB. Hann hevur bert vant í fáar mánaðir, og millum mótstøðumenninar taldust tveir norðurlendskir meistarar.

### 14. desember

Venjarin hjá kyndilskvinnunum, Birgir Hansen, boðar frá, at hann gevst sum venjari. Lotte Sørensen er upp á tal sum nýggjur venjari.

Í Fuglafirði og Gøtu arbeiða tey við at skifta graslíkisvøllirnar, og í fyrsta umfari eru royndir av nýggjum vølli fingnar til landið.

### 15. desember

Eftir at hava tapt seks ferðir á rað í grannauppgerðini vinna kyndilsmenninir endiliga á Neistanum. Hjá kvinnunum gongst ikki eins væl, og har mugu tær grønu boyggja seg fyri grannunum í steypakappingini.

### 16. desember

Lagt er upp til stórdyst, tá oddaliðini í bestu hondbóltsdeildini, VÍF og Stjørnan tørna saman um vikuskiftið.

### 19. desember

VÍF er nú einsamal á odda hjá kvinnunum. Tær vinna á Stjørnuni, og fara tí til endaspælið við einum stigi meira enn klaksvíkskvinnurnar.

Í Klaksvík hava tær annars styrkt liðið til endaspælið. Stórskjúttin hjá Sóljuni, Simona Dziugyte, fer til Klaksvíkar at spæla.

Í flogbóltinum tykist alt at snúgva seg um Klaksvíkin, har bæði kvinnur og menn eru fremst, tó at kvinnurnar hava harða kapping frá Drátti.

Grunnurin fyri Tórsvøll arbeiðir við eini ætlan um, at tak skal leggjast yvir áskoðaraplássini.

Ungdómslandsliðini í flogbólti skulu aftur í eldin komandi ár, og Jógvan Martin Olsen tykist ikki ónøgdur um lutakastið hjá føroysku liðunum.

### 20. desember

UEFA tykist nú vera nógv meira sinna til at nýta graslíkisvøllir í altjóða høpi. Í løtuni royna teir nýggja slagið av graslíki í Sveis.

Finalan í Coca-Cola kappingini í hondbólti verður flutt, tí U-21 landsliðið skal royna seg um sama mundi.

### 21. desember

Sterkastu føroyingarnir, Regin og Sámal, gera seg til at kappast við heimsins sterkasta par, sum er úr Finnlandi. Ætlanini var annars at kappast við danir, men vegna forfall er mótstøðan nú harðnað.

Umframt at stekur menninir skulu kappast, verður fyri fyrstu ferð eisni kappast í sonevndu miss galaxy kappingini í Føroyum.

### 22. desember

Býráðið í Havnarbeiðir við at yvirtaka høllina á Háldi, sum krevur stórar umvælingar.

Mansliðið hjá VÍF endar endaspælið við einum sigri, og kunnu bæði kvinnur og menn sostatt fara til endaspælið við fullum stigatali. Hetta tí liðini bert hava ein javnleik í part, meðan restina av dystunum eru endaðir við sigri.

### 30. desember

Regin Vágadal og Sámal Johannis Joensen gera ikki mætari enn at vinna á finnlendingunum, sum annars fýra ár á rað hava verið heimsins sterkasta par.

Føroyska umboðið til miss galaxy kappingina komandi ár verður Sóleyð Jacobsen.




*Regin Vágadal og Sámal Jóhannis Joensen framdu seinast ítróttabragdið á árinum, tá teir vunnu styrkiskappingina móti heimsins sterkasta parið*



## VIÐMERKINGAR

# Tíðin komin at seta ALS-útgjaldið upp til 90%

**Hans Pauli Strøm,**
*javnaðartingmaður*

Merkiligt er at hoyra, hvussu tann stóri politiski áhugin fyri tí góðu fíggjarstøðuni hjá Arbeiðsloysisskipanini bert snýr seg um hetta eina: hvussu inngjaldið kann minkast, og hvussu politisku myndugleikarnir síðani kunnu útnytta hesa lækkingina í ALS-inngjaldinum til at áleggja pørtunum á arbeiðsmarknaðinum onnur nýggj gjøld og aðrar uppgávur ístaðin, sum onki hava við arbeiðsloysisskipanina at gera.

Men politiski myndugleikin tekur ikki upp á tungu tað, sum er sjálvt høvuðsmálið við ALS:

- í fyrsta lagi hvussu skipanin skal gerast betri før fyri at tryggja arbeiðsleysum eitt nøktandi endurgjald fyri tørvandi arbeiðsinntøku, og
- í øðrum lagi hvussu skipanin skal berast betri før fyri at ávísa ella útvega arbeiðsleysum arbeiðstilboð, ella við útbúgvingartilboðum geva arbeiðsleysum nýggjar vinnumøguleikar.

Veruleikin er, at Arbeiðsloysisskipanin nú stendur á so sterkum fíggjarligum grundarlagi, at tað lága útgjaldið, sum varð ásett beint undan tí búskaparliga húsaganginum fyri 8-9 árum síðani, nú trygt kann verða sett upp frá 70% til 90% av eini arbeiðaraløn.

Tá ið 1998-ársroknskapurin hjá Arbeiðsloysisskipanini í mai 1999 varð sendur út, varð tíðindaskriv sent fjølmiðlunum og øðrum áhugaðum. Í hesum tíðindaskrivi varð sagt frá, at stýrið fyri ALS hevði umrøtt møguleikan fyri at hækka útgjaldið, og at hesin spurningur væntandi fór at verða tikin uppaftur í árinum, tvs. í 1999.

1999 er farið, og nú ið 2000 er komið at enda, frættist í bløðunum, at spurningurin er umrøddur í ALS-stýrinum. Tað eru fakfelagsumboðini, sum hava kravt eitt hægri útgjald. Men tað er kveistrað til viks av stýrisformanninum saman við arbeiðsgevaraumboðunum. Hesi halda at 70% av eini arbeiðaraløn – tað eru eini 9.000 kr um mánaðin, áðrenn skattur er farin av – er nóg mikið hjá einum arbeiðsleysum at klára at forsyrgja sær sjálvum og familjuni við ! Tey halda, at fólk eru sovorðin dovin beist, at verður arbeiðsloysisútgjaldið størri, so tíma fólk ikki longur at arbeiða! Sambært Dimmalætting nú uppundir nýggjárið heldur stýrisformaðurin, at verður útgjaldið hægri, so er vandi fyri at ”tað tekur tað arbeiðshugin frá fólki” !

Men hvar hava tey tann vísdómin frá, at tað er sunt at revsa fólk, sum verða arbeiðsleys, við bert at veita teimum eitt endurgjald uppá tveir triðingar av minstalønini í landinum?

Her er so rørandi semja millum arbeiðsgevarameirilutan í ALS-stýrinum og tann borgarliga politiska meirilutanum á løgtingi og í landsstýri. Teirri víðskygni við arbeiðsloysiskipanini tykist ikki at røkka longur enn at minka um ALS-gjaldið, fyri at kunna flyta aðrar almennar útreiðslur av fíggjarlógini yvir á partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

So hvørt sum búskapurin seinastu árini aftur er komin fyri seg og arbeiðsloysið er minkað, er inngjaldið til ALS fleiri ferðir



sett niður. Aftaná at tað lá uppi á 2,75% øll kreppuárini, er tað síðani 1997 stigvíst minkað, síðstu ferð 1. juli 2000 niður í 1,50% . Og tað skal aftur nú 1. apríl 2001 lækkað við 0,25% - samstundis sum nýtt gjald uppá júst 0,25% verður álagt løntakarum og arbeiðsgevarum til at fíggja nýggjan barnsburðargrunn.

Tað er sjálvandi at fegnast um, at tað ikki er longur neyðugt hjá ALS at taka so nógv inn sum áður. Men eiga vit tá ikki samstundis at krevja, at ALS eisini skal betra um sømdirnar til teirra, hvørs kor skipanin er gjørd til at tryggja, nevnliga teimum arbeiðsleysu?

Hóast inngjaldsprosentið støðugt er minkað, hevur ALS seinastu árini havt stórt rakstraravlop:

1997: 66 mió. kr.
1998: 71 mió. kr.
1999: 72 mió. kr., og væntað
2000: 60 mió. kr. – hóast inngjaldið er sett tvær ferðir niður í hesum árinum!

Mett verður, at ALS nú við árslok hevur einar 250 mió. kr. á bók. Fíggjarliga grundarlagið undir ALS er sostatt sterkt, og hóast inngjaldið verður sett uppaftur longur niður komandi ár, fer ALS framvegis at hava stórt rakstraravlop, kanska einar 45-50 mió. kr. um árið.

Ein hækking av útgjaldinum frá 70% til 90% av eini arbeiðaraløn kann metast at minka rakstraravlopið við útvið 20 mió.kr., mett út frá gongdini í 2000-tølunum.

Tvs. at hóast inngjaldið verður sett niður til 1,25% og útgjaldið sett upp til 90%, so fer skipanin framvegis at hava stórt rakstraravlop, einar 25-30 mió. kr. um árið.

Tí ber nú til hjá ALS bæði at hækka útgjaldið, og samstundis framhaldandi styrkja búskaparliga grundarlagið undir skipanini, so hon eisini verður før fyri at standa ímóti verri tíðum.

Samstundis sum útgjaldið verður hækkað, eigur ALS eisini at gerast nógv betri før fyri at ávísa ella útvega arbeiðsleysum arbeiðstilboð, ella við útbúgvingartilboðum geva arbeiðsleysum nýggjar vinnumøguleikar. ALS átti t. d. at kunna lúka eitt krav um at skula útvega einum arbeiðsleysum eitt arbeiðs- ella útbúgvingartilboð innan 3 mánaðir.

Á tann hátt kann ALS røkja sítt mál: at veita tí arbeiðsleysa eitt nøktandi endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, og skjótast gjørligt fáa tann arbeiðsleysa útaftur í eitt virkið lív á arbeiðsmarknaðinum.

Hetta skal vera mítt nýggjársynski fyri Arbeiðsloysisskipanina og mín vón til nýggja stýrið fyri ALS, sum skjótt fer at taka við.

# Dupultspæl

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður*

Hvørjum dámar at viðurkenna tann fullkomna ósigurin? Nærum ongum, og tí uppliva vit eisini dagliga eitt frustrerað landsstýrið, ið framhaldandi roynir at grugga og halda føroyingar í óvissuni um, hvat ið henda skal framyvir viðvíkjandi ríkisrættarligu viðurskiftum okkara.

Longu áðrenn landsstýrið fyri 4. ferð fór til Danmarkar til samráðingar, lá nýggja ætlan teirra klár. Danir skuldu konfronterast við kravið um at viðurkenna okkum sum sjálvstøðug tjóð. Tá danir av góðum grundum ikki kundu ganga landsstýrinum á møti, fór alt spinnaríið í gongd. Tá propagandafulltrúin uppøstur (sambært sjónvarpinum) kom út av samráðingarfundinum og proklameraði, at danir noktaðu at viðurkenna okkum sum tjóð, tá sóu mong tað, sum tey longi høvdu stúrt fyri, at landsstýrið varð avdúkað fyri opnum skermi, spillnakið, sum hopleysir amatørar.

Tann sjónleikur, ið landsstýrið hevur framført, síðan tað kom heim aftur, er tragikomiskur. Fyrst fóru teir at ivast í, um vit vóru ein tjóð, og síðan bleiv fráboðað, at nú skuldi yvirtakast eftir heimastyrislógini. Onkur proklameraði fullveldið í 2006, ein boðaði frá, at vit gjørdust republik í 2006-7, og onkur annar segði, at hinir sendu upp fýrverk, tí tað, sum avtalað varð millum samgonguflokkarnar, var, at vit fáa fullveldi sum fralíður.

Tað, ið henda samgonga hevur lagt fyri dagin, má vera eindømi í vesturlendskum diplomati og samráðingarkynstri. Ein og hvør, ið ætlar sær at fáa nakrar sømdir frá mótpartinum, hitar ikki upp til samráðingar við at kalla mótpartin fyri imperialistar, koloniharrar og harrafólk. Tá er úrslitið givið frammanundan.

Eitt er, at veljarar hjá samgonguflokkum nýta hesi negativu heiti um danir, men tað sum verri er, er, at okkara landsstýrismenn og løgtinglimir ganga á odda í hesi herferð.

Danskt blað endargav varaløgmann fyri at hava samanborið føroyingar við krevjandi babyar, ið ikki vilja úr grulvigarðinum, men liggja bara og rópa eftir meiri mati (ríkisveiting). Vit eru eisini samanborðin við rúsevnismisnýt-



arar, ið ikki vilja av við sproytuna (ríkisstuðulin).

Hvat skal vanligi danin halda um slíkar útsagnir? Sjálvandi følir hann seg provokeraðan. Hann vil hvørki hava sitandi á sær, at hann er imperialist ella pushari, ið fyllir føroyingar og føroyskan búskap við rúseitri.

Tey, ið kenna til viðgerð av rúsevnismisnýtslu, vita, at tað nyttar lítið at læra ein misnýtara at læra at nýta rúseitur. Tí er púra burturvið at biðja pusharan um rúseitur í 15 - 20 ár framyvir, um ein veruliga ynskir at gerast edrúur. Er ríkisstuðulin at fata sum rúseitur, so eru 4 ár eisini deyðilig. Einasta viðgerðin, ið gevur úrslit, er, at alt rúseitrið verður tikið í einum.

Niðurtúrurin er øgiligur, men har er ongin bøn, um ein skal gera sær vón um at síggja edrúa veruleikan.

Danir og nógvir føroyingar við, standa púra býttir og undrandi yvir hetta landsstýrið, sum í veruleikanum biður um meira rúseitur, samstundis sum tað ynskir seg edrút.

Landsstýrið og samgongan hava eina løgna fatan av ríkisstuðlinum. Verður hann nýttur til tað, hann er ætlaður til, at halda føroyska vælferðarsamfelagnum á einum sømiligum støði, so er hann rúseitur. Men verður hann nýttur til at leggja til síðis til eina forfongiliga politiska ætlan, so er hann vælkomið rúseitur at taka til, um framtíðin gerst ov edrú.

Tað gerst alt greiðari, at arbeiðshátturin hjá landsstýrinum er so lúsutur og undirgravandi, at, tá ið teir ikki fáa sannført føroyingar um fullveldisætlanina við verandi treytum frá dønum, so verður hin parturin av strategiini nýttur, nevniliga at provokera danir somikið, at teir av sínum eintingum loysa fyri okkum.

Tað, sum er altavgerandi fyri landsstýrið, er ikki vælferðin hjá okkum, men fáfongd. Hesar metodur ella strategiir eru vælkendar millum felagsskapir, ið ikki arbeiða eftir demokratiskum grundsjónarmiðum, og sum heldur ikki hava fólkið aftan fyri seg. Teir eru so fullvísir um egnan førleika og politisku ætlan sína, og at fólkið einaferð fer at takka teimum.

At samgongan, ið ikki v i ð u r k e n n i r heimastýrislógina sum karm um okkara ríkisrættarligu viðurskifti, nú skal til at umsita hana og yvirtaka málsøkir eftir henni, eigur ongin, ið veruliga ynskir framburð og sjálvstýri at føla seg tryggan við. Tað, sum vit koma at uppliva framyvir, verður skorið eftir sama leisti sum higartil, at tað, sum hesir amatørar ikki makta við sakligum sjónarmiðum, ætla teir sær at vinna við konfrontatión.

Mítt jólaynski skal vera, at landsstýrið tekur av teimum treytum, ið eru og letur føroyingar taka støðu til fullveldi. Tá fæst eisini greiða á, um føroyingar halda, at treytirnar eru nøktandi karmur um teirra vælferð og framtíðarmøguleikar. Heldur fólkið tá nakað annað enn landsstýrið, so eigur landsstýrið at leggja frá sær og viðurkenna, at hvørki teir ella tíðin er búgvin.

## Songløta í Betesda Nýggjársaftan kl. 17

Í 30 ár hevur Betesdakórið sungið smærri klassisk stykki og brot úr størri verkum á nýggjársveitsluni. - Tað gjørdi kórið eisini á nýggjárveitsluni sum var í gjárkvøldið.

Umframt hetta verður ein songløta nýggjársaftan kl. 17 í Betesda - har øll eru vælkomin ung sum eldri.

Dentur verður lagdur á felagssong saman við kórinum. Okkurt tónleikastykki verður at hoyra og solosangur.

Kórið fer síðani at syngja: Die ehre Gottes (Tær heiður alvaldi) av Beethoven, Ave Verum av Mozart og And the Glory og Halleluja úr Händels Messias.

Poul Færø kemur at hava eitt stutt orð viðvíkjandi ársskiftinum.